NVD *Rit*

SERRITGERÐ
Thesis

TØKNIFRÁGREIÐING
Technical Report

UNDIRVÍSINGARTILFAR
Teaching Material

UPPRIT
Notes

# Túrfrágreiðing

## Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

## 29. mars- 5. april 2000

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*March 29th – April 5th 2000*

Eyðfinn Magnussen




NVD*Rit* 2000:1

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN
Faculty of Science and Technology

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

Heiti / Title **Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka**
**29. mars- 5 apríl 2000**
*Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*
*Mars 29th - April 5th 2000*

Høvundur / Author **Eyðfinn Magnussen**

Ritslag / Report Type Tøknifrágreiðing/*Technical Report*

NVD*Rit* 2000:1
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

**Fólk frá FRS:** Arnhold Henriksen, Rógvi Mouritsen, Marit Pedersen og Eyðfinn Magnussen

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa eitt mát fyri nøgdini og biologiini, hjá teimum týdningarmestu fiskasløgunum, ið finnast á Føroyabanka. Eisini varð hugt at teimum oceanografisku viðurskiftunum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum og við vanligum grunni. Breidlarnireru 60 m og 120 m, Steinhamns lemmar, Minilog temperatur- og dýpdarmátari, Seabird-CTD og WP-2 glúpur.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini 30. mars kl. 21.00. Fyrsta CTD-støðin varð tikin á Føroyabanka 31. mars kl. 04.05. Seinasta støðin varð tikin 4. mars kl. 15.35. Túrurin samsvaraði ikki heil við ætlanina. Fríggjadagin 31. mars kl 15.40 løgdu vit bakk, tí ikki var fiskandi vegna veður. Byrjað var aftur at fiska leygardagin 1. apríl kl. 11.19. Hetta gjørdi, at 5 djúpar støðir (1753, 1833, 1842, 1851, 1853) SW á Føroyabanka í fyrsta lagi vórðu útsettar og seinri heilt avlýstar. Eina støð (1722) lukkaðist ikki at taka, hóast roynt var 4 ferðir.Tyknar vóru sostatt 23 trolstøðir og 12 CTD og djóraætisstøðir.

**Prøvataking:** Hesir prøvar vóru tyknir:

| Fiskaslag | Nytrar | Magar |
|---|---|---|
| Toskur | 235 | 63 |
| Hýsa | 376 | 96 |
| Upsi | 218 | 65 |
| **Tilsamans** | **829** | **221** |

Ì sýnishondbókini verður miðað eftir at taka 400 nytrar av hvørjum av omanfyri nevndu fiskasløgum, hettar var tó ikki møguligt, av tí at ov lítið var at fáa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Magarnir vórðu sorteraðir umborð. Mátingarnar frá temperaturmátarinum á trolinum eru upparbeidd. Úrslitini eru klár og verða víst í hesi frágreiðingini. Úrslitini frá Imponatorskipanini eru rættlisin og nytrarnar verða lisnar í hesum døgum.

**Fyribils úrslit og endalig úrslit:**

**Veiðan:** Av tí at øll innlesingarforritini til databasuna enn ikki eru liðug, eru dataini enn ikki løgd í databasuna. Tí ber ikki til at koma við einari útgreining av veiðuni og støddarbýtinum av teimum ymisku fiskasløgnuum, sum vóru fingin á Føroyabanka-túrinum. Veiðúrslitini í hesi frágreiðing byggja tí einast á landingarseðilin frá uppoðssøluni á Toftum (talva 1). Tøl fyri landaðu veiðuna í 1999 eru ikki tøk, av tí at Føroyabankatúrurin í 1999 gjørdist framhald av yvirlitistrolingunum á Landgrunninum vegna verkfallið, ið tá var. Úrslitini verða tí samanborðin við landaðu veiðunia frá yvirlitistrolingini í mars í 1998.

| Fiskaslag | Landað veiða (kg) apríl 2000 | Landað veiða (kg) mars 1998 |
|---|---|---|
| Toskur | 4.684 | 8.096 |
| Hýsa | 3.278 | 4.815 |
| Upsi | 3.910 | 422 |
| Longa | 20 | 121 |
| Blálonga | 0 | 1 |
| Brosma | 5 | 9 |
| Kongafiskur | 126 | 49 |
| Havtaska | 20 | 0 |
| Annað | 0 | 31 |
| Tilsamans | 12.043 | 13.544 |

***Talva 1**: Landaða veiðan frá Føroyabankatúrinum 31. mars – 4. apríl 2000.*

**Toskur:** Íalt vóru 4.684 kg av toski landaði frá Føroyabanka-túrinum, samanborið við 8.096 kg sama túrin í 1998. Samanumtikið kann sigast, at minni var at fáa av toski enn undanfarin ár. Bert eitt stórt hál var fingið av toski. Hettar var á støð 00200020 í punti 1717, har uml. 5.000 kg vóru veidd. Hettar er vanliga ein góður toskapuntur. Í mars 1998 vóru fingin 3.464 kg í hesum puntinum.

**Hýsa:** Í alt 3.278 kg av hýsu vórðu landaði. Í mars 1998 vórðu landaði 4.815 kg.

**Upsi:** Landaða veiðan av upsa var 3.910 kg móti einans 422 kg í mars 1998. Mesta av upsaveiðuni hendan túrin kom úr einum háli á støð 00200037 í punti nr.1813, har uml. 5.000 kg vóru fingin.

**Hiti:**Á mynd 1 er miðalhitin á botni vístur fyri hvørt hál. Miðaltølini eru hitin mátaður niðri við botnin, meðan tovað verður. Á myndini sæst, at sjógvurin er heitastur norður-eysturlaga á bankanum, meðan hann er eitt sindur kaldari vestari á Bankanum.




*Mynd 1: Miðalhitin við botnin fyri hvørt tov mátaður í tíðarskeiðnum 31. mars – 4. apríl 2000.*

**Viðmerkingar:** Ongin

Tórshavn 12. apríl 2000

Eyðfinn Magnussen